# Danielsen sendi Dalbúð í lægri deild

**1. DIVISIÓN** Ein sigur var einfalda kravið, men Hvidovre tapti í móti FC Roskilde, og tískil flytir liðið hjá Øssur Dalbúð eina deild niður. Hinvegin vann FC Fyn hjá Viljormi Davidsen og tískil er framvegis vón fyri teimum

Rólant Waag Dam

Feløgini umboðað við føroyskum leikarum í næstbestu donsku deildini, eru vorðin eitt færri, nú Hvidovre, sum Øssur Dalbúð hevur verið knýttur at síðani januarmánað, tapti Dýra Biðidag. Felagið hevur tvinnar dystir eftir og seks stig upp um markið, men málúrtøkan er 25 mál verri enn kappingarneytin omanfyri markið. Øssur Dalbúð, sum fekk nakrar minuttir seinast Hvidovre spældi, varð soldaður frá beint áðrenn endaligi hópurin varð úttikin og slapp tískil ikki upp í part.

Hóast lagnan hjá Hvidovre nú er kend, er ikki greitt, hvar føroyski áleyparin spælir eftir summarsteðgin. Sáttmáli hansara við niðurflutta felagið gongur út við kappingarársenda, so Øssur Dalbúð skal nú finna út av, hvørt hann leingir við felagið og spælir í triðbestu donsku fótbóltsdeildini, ella um hann fer at royna nýggjar leiðir.

Tað var liðið hjá Atla Danielsen, FC Roskilde, sum gav Hvidovre mønustingin. Landsliðsleikarin átti ikki beinleiðis leiklut í hesum við frísparki ella uppleggi, men við sínum sentrala leikluti á miðvøllinum gjørdi hann sítt til, at FC Roskilde vann seg upp á sætta plássið í deildini. Megnar liðið at varðveitti plássið, er hetta besta úrslitið hjá FC Roskilde nakrantíð.



*Atli Danielsen og FC Roskilde liggja nummar seks í deildini. Heldur hetta sær, er talan um besta árið í søgu felagsins*

### Viljormur við í máli

Hin føroyingurin í botninum, Viljormur Davidsen, stríðist framvegis fyri at lívbjarga FC Fyn. Fríggjadagin hevði hann ein fingur við í spælinum, tá teir hálaðu ein tryggan sigur í hús í móti uppflytarunum FC Hjørring. Viljormur røkti, sum vant, setningin sum bakkur dystin á tamb, og kom eisini framvið í borðunum við jøvnum millum bili. Bakkum so líkt, tók Viljormur sær av innkøstunum og tað var eitt av hesum longu køstunum, ein liðfelagið stútaði framvið málverjanum, sum kom nakað skeivt út. Hetta málið var tað fyrsta í 0-3 sigrinum hjá FC Fyn, sum samstundis var ársins fyrsti sigur á útivølli hjá Viljormi Davidsen og liðfeløgum hansara.

Liðini í næstbestu donsku fótbóltsdeildini skulu øll aftur í eldin í annaðkvøld, tá næstseinasta leikumfar í næstbestu donsku fótbóltsdeildini verður avgreitt.

*rolant@sosialurin.fo*

# Holst vísti stórspæl

**1. SUPERLIGAN** Landsliðsleikarin vísti seg frá síni allarbestu síðu, tá hann bæði skoraði og legði upp til mál fyri Silkeborg

Rólant Waag Dam



Christian Lamhauge Holst staðfesti sigurin í ótrúliga spennandi dystinum millum Silkeborg og AaB Dýra Biðidag. Dysturin endaði ikki minni enn 4-3.

Føroyski landsliðsleikarin byrjaði dystin í høgra borði, men eftir at hava umskipað liðið varð Holst leikarin, sum bant miðvøll og álop saman. Ein uppgáva, hann loysti til fulnar. Holst var upphavsmaður til fleiri góðar møguleikar, og hevði eisini onkrar royndir sjálvur. Tað var tó fyrr enn, at dysturin skuldi avgerast, at Holst veruliga gjørdi bart.

Beint fyri steðgin varð Holst spældur púra leysur. Landsliðsleikarin spældi tvørtur um og liðfelagin skoraði trygt til 3-2. 12. minuttir fyri leiklok var Holst aftur framvið, men hesaferð sum málskjútti, tá hann lættliga setti bóltin í netið til 4-2. Tað eydnaðist AaB at minka um munin til 4-3, men nærri komu teir ikki.

– Hetta var ein deiligur dystur og eg kendi meg sera væl á miðvøllinum, har eg í stóran mun hugsaði um framrættaða spælið, segði Christian Lamhauge Holst við heimasíðuna hjá Silkeborg eftir dystin.

Silkeborg liggur nummar fimm í bestu donsku deildini, sjey stig aftanfyri nummar fýra og við tveimum umførum eftir at spæla.

*rolant@sosialurin.fo*

# Lava nærkast toppformi

**LÆGRU DEILDIRNAR** Andreas Lava Olsen vísti stórspæl um vikuskiftið við máli og fleiri uppleggum, og Johan Troest Davidsen og Krzysztof Popczynski eru aftur á sigurskós

Rólant Waag Dam

BK Frem vann annan dystin á rað við sjey málum. Og aftur hesaferð taldist føroyski áleyparin millum málskjúttarnar. Leygardagin var tað næstbesta liðið hjá Vanløse, sum stóð fyri skotum – ella skotunum hjá Andreas Lava Olsen og liðfeløgum hansara.

Fýra ferðir hevði leirvíkingurin næstseinasta fótin á bóltinum, og einaferð setti hann sjálvur leðurkúluna í kassan. Andreas Lava Olsen legði upp til tey bæði fyrstu málini, har hann í báðum førum breyt í gjøgnum í høgru og legði bóltin væl inn fyri. Triðja málið gjørdi landsliðsáleyparin sjálvur, tá hann rann frá verjuni og setti bóltin millum beinini á málverjanum. Fjórða málið fall eftir fína avlevering frá gamla Víkinginum og LÍFaranum, og fimta málið kom eftir ein spurt, har Lava setti fleiri mans av og legði bóltin tvørtur um til liðfelaga, sum skoraði trygt.

Eftir stórspæl í smáar 80 minuttir, tók venjarin Andreas Lava Olsen av vøllinum, men tað eydnaðist BK Frem at skora tvær ferðir aftrat og vinna heili 1-7! Fyri hvønn dyst sum gongur og hvønn sigur, sum kemur í hús, nærkast málið um uppflyting í fjórðbestu donsku deildina.

### Troest og Popczynski sigraðu

Eisini í triðbestu donsku deildini droyma menn, sum hava spælt í Føroyum í nógv ár, um uppflyting. Landsliðsleikarin Johan Troest Davidsen spældi allan dystin sum vongverji, tá lið hansara, Aarhus Fremad, undir leiðslu av Krzysztof Popcynski vann 2-1 á uppflytarunum FC Djursland. Hinvegin vann kappingarneytin Blokhus eisini, so støðan í oddinum er óbroytt, har Blokhus førir við fimm stigum niður til Troest og Popczynski. Tað eru fýra umfør eftir at leika í 2. división Øst, sum deildin hjá Aarhus Fremad rópast.

*rolant@sosialurin.fo*



*Mynd: Rólant Waag Dam*